# Happarar skulu steðgast

**Á Kommunuskúlanum í Havn hava tey heilt greiðar mannagongdir, tá happing tekur seg upp. Øll foreldrini fáa fráboðan um trupulleikan, sum samstundis verður tikin upp í flokkinum. Eisini er ein telefonlinja, har næmingar kunnu ringja, um tey verða happað, men ikki tora at siga tað í skúlanum**

HAPPING

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Harriet P. Vágadal, lærari á Kommunuskúlanum í Havn, er ein av teimum, sum hevur tikið stig til at gera nakað ítøkiligt, tá happing tekur seg upp í flokkinum. Hon hevur millum annað verið við til at gera ein faldara, sum vendir sær til foreldur og næmingar, har greitt verður frá, hvat happing er fyri nakað, og hvørjar avleiðingar tað hevur. Eisini varðar Harriet av eini telefonlinju, har næmingar, sum verða happaði ella vita um happing í flokkinum, kunnu venda sær. Telefonlinjan hevur



*Tað er ikki altíð nøkur loysn, at flyta tann happaða úr flokkinum ella skúlanum, tí happarin finnur sær skjótt eitt nýtt offur, sigur Harriet P. Vágadal, lærari á Kommunuskúlanum*

virkað í út við eitt ár, og higartil hava ikki so fáir næmingar nýtt hendan møguleika.

### Happararnir

Harriet greiðir frá, at fyri tey allarflestu er tað sera flovisligt og mannminkandi at verða happað. Tí gera happingaroffur ofta nógv fyri at fjala út yvir trupulleikan, og tað skal ofta nógv til, áðrenn tey sjálvi venda sær til onkran vaksnan at biðja um hjálp.

- Tí er tað eisini so umráðandi at bæði foreldur og lærarar eru tilvitaði um tekinini um happing og ikki minst ta fjaldu happingina, sum ofta er verri enn tann sjónliga. Eru vit tað, eri eg sannførd um at tað bæði ber til at forða og steðga happing, sigur Harriet.

Sum tekin um happing nevnir Harriet strongd, at næmingurin roynir at flýggja og heldur seg fyri seg sjálvan í skúlanum ella skulkar illa fyri at sleppa undan happingini.

- Teir fjaldu happarnir eru ofta ringir at fáa eyga á, tí teir ofta duga serliga væl at vera fittir og vinarligar móti læraraum og stjóranum. Hetta eru næmingar, sum duga væl at samla onnur rundan um seg, og fáa tey at gera tað skitnað arbeiðið, tá onkur skal happast. Samanumtikið kann sigast um happarar, at teir eru serliga øvundsjúklir og tola illa at fáa kapping.

### Mekling ikki altíð ein loysn

Sjálv meinar Harriet, at vit fyrst eiga at seta fokus á happaran, tá happing tekur seg upp í flokkinum. Hann eigur at konfronterast við avleiðingarnar av happingini. Eydnast tað ikki at fáa hann at broyta atburð, eigur hann kanska at verða fluttur úr flokkinum. Ì øllum førum er tað ikki nøkur loysn at flyta tann happaða úr flokkinum, tí happarin finnur sær skjótt eitt nýtt offur.

- Harriet heldur hugskotið við skúlamekling verða eina møguliga loysn, um happingini bert hevur staðið uppá í stutta tíð. Hevur ein næmingur hinvegin verðið happaður í áravís, heldur Harriet tað ikki vera ráðiligt, at konfrontera hann við happaran.

- Ein næmingur, sum hevur verðið happaður áhaldandi í fleiri ár, er ofta so niðurbrotin og illa fyri sálarliga, at hann ikki torir ella megnar ar standa andlit til andlit við happaran, sum kanska situr har við einum skeivum smíli og lúnskum eygnabrá. Tá kann talan ikki blíva um samskifti á sama støði, og tí gevur tað ikki so nógva meining við einum meklara, heldur Harriet, sum sjálv hevur royndt hendan háttin at steðga happing.

Í teimum førum, har happing hevur verið ein trupulleiki í einum flokki hjá Harriet, hevur hon heldur tosað fyrst við allan flokkin um, hvat happing í grundini er fyri nakað, og hvussu stóran skaða tað kann gera.

- Hetta snýr seg grundleggjandi um, at næmingar læra at síggja, at soleiðis hevur ongin rætt til at uppføra seg. At teir læra at seta seg inn í støðuna hjá einum, sum verður happaður og í heila tikið broyta hugburð til, hvussu vit eiga at vera ímóti øðrum menniskjum, sigur Harriet.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 40, 2005
www.kaupthing.fo

# Oljuprísurin lækkaður 20%

MARKNAÐARRÁK

Oljuprísurin er lækkaður hendan seinasta mánaðin, og í farnu viku lækkaði hann heili 10%, úr 63 til 57 dollarar fyri tunnuna (Brent). Hann er nú lækkaður umleið 20% síðan Katrinu. Tað var væntandi, at hann lækkaði eitt sindur eftir at hava rokkið 70 dollarar fyri tunnuna. Vit vænta tó, at hann innan ov leingi hækkar aftur upp ímóti 70 dollarum. Fríggjadagin kom amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri septembur. Tað er enn óvist, hvussu nógv hon er ávirkað av ódnunum Katrinu og Ritu. Tí taka íleggjarar hana hesuferð í minni álvara enn vanligt. Hon vísti seg at vera nógv betri enn væntað, men hvørki parta- ella lánsbrævamarknaðurin flutti seg nakað serligt.

### Realkredittlánsbrøv í andgletti

Lánsbrævarenturnar hildu áfram at hække.spakuliga í farnu viku (sí mynd). 10-ára danska rentan er nú 3,13%. Hetta er seinasti mánaðin, at lántakarar kunnu innloysa realkredittlán í úrtíð til januar-termina. Um tað verða fáar innloysingar, geva hesi realkredittlánsbrøv gott avkast í mun til statslánsbrøv.

### Partabrøv lækkaði

Íleggjarar á partabrævamarknaðunum gjørdu sær í farnu viku dælt av tí stóru virðisøking, sum hevur verið á partabrøvum sum heild síðan august. Tað fekk norrøn partabrøv at lække 2,3% í vikuni. Hendan vikan er byrjað við eini lítlari hækking. Nú byrja virkini at kunngera roknskap fyri 3. ársfjórðing, og hetta fer at seta dám á partabrøvini hendan mánaðin. Hesa vikuna koma tvey sera týðandi virkir við roknskapi, tað eru Apple Computer og General Electric. Greinarar vænta hækkandi inntøkur hjá báðum.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verður USA í andgletti. Tað koma tíðindi frá tjóðbankanum, og fríggjadagin koma álitis-, sølu- og prísvakstrartøl. Til fríggjadagin kann væntast, at fíggjarmarknaðirnir framvegis fara at meta seg eftir oljuprísinum. Partabrævamarknaðirnir fara haraftrat at leggja dent á roknskaparkunngerðir fyri 3. ársfjórðing.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 615,18 | -0,9% |
| JPY | 5,40 | -1,2% |
| GBP | 1.083,45 | -1,0% |
| NOK | 94,36 | -0,4% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,70 | -0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 175,57 | -0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 101,00 | -2,3% |
| Altjóða Vøkstur | 66,51 | -3,6% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*